## Leygardagin 19. februar kl. 17 (e)

Í sendingini verður vitjað á elbilaráðstevnuni í Norðurlanda-húsinum. Samrøður eru við ymisk fólk á ráðstevnuni sum t.d. Hákun Djurhuus frá SEV, Jákup Sørensen frá NORA, Jákup Jacobsen frá Akstovuni, Esben Pedersen frá Tesla Motors, Kartna Jacobsen frá Sløkkiliðnum, Kára Sólstein frá Kring-varpinum og Tummas Paula av Reyni frá Trygd.

Ein Tesla Roadster elbilur verður royndarkoyrdur saman við Magnusi Magnussen frá SEV.

Eisini verða samrøður við Anthonius Dalsgaard og Heðin Weihe frá Auto Service um elbilin Peugeot Partner Van Electric, og við Magnus Remberg frá Ivan Bilum um elbilin Mitsubishi iMiEV.

*** Sendingin verður eisini endursend sunnudagin 20. februar kl. 17**


Esben Pedersen


Heðin Weihe


Magnus Magnussen

Vinnu- & bilradio á Rás 2



BYGMA HITI

# BYGMA HITI SØKIR
## lærling til nýggja handilin

Bygma Hiti hevur nýliga latið nýggjan handil upp saman við Bygma Balslev. Vit leggja dent á at vera fremst innan veitan av HVS loysnum og loysnum innan alternativa orku.

Vit sóknast eftir lærlingi til handilin. Her hevur tú møguleikan at arbeiða í eini spennandi og gevandi fyritøku.

**Vit vænta:**
- at tú hevur FHS- ella HH-prógv.
- hevur hug at útbúgva teg innan HVS.
- hevur áræði og góðan hug til handilsarbeiði.
- hevur lætt við at samstarva við onnur, og ert fyrikomandi.

**Vit bjóða:**
- løn samb. S & K
- eitt vælskipað og trygt arbeiðspláss í stórari menning.
- góðar arbeiðsumstøður og góðar arbeiðsfelagar.

Lærutíðin er 2 til 3 ár, alt eftir útbúgving, og umfatar eisini skeið í Danmark 4 ferðir 2 vikur, umframt endaliga uppgávu.

Um tú heldur at hetta er nakað fyri teg, so send okkum skrivliga umsókn við møguligum viðmælum.

Best er um tú kanst byrja tann 7. mars annars eftir avtalu.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 2. mars.

Fleiri upplýsingar um starvið, fáast við at tosa við Áka Mortensen, e-mail: am@hiti.fo tel. 23 89 90

Bygma Hiti - á Brekku 3 - tel 31 50 08 - www.hiti.fo - hiti@hiti.fo

# Intrum verður Inntriv

**Inntriv** er nýggja navnið hjá Intrum Føroyar. Altjóða navnið, Intrum Justitia, verður ikki longur brúkt. Samstarvið við Intrum Justitia heldur tó áfram.

Vælkenda slagorðið "Ikki gera ikki nakað" og dómarin við gula kortinum, verða partur av nýggja samleikanum.

Okkara strategi er, at verða heildarveitari innan innheinting. Endamálið hjá okkum er óbroytt, at bøta um peningastreymin og úrslitið hjá kravánarum, uttan at skaða sambandið millum kravánaran og skuldaran.




Inntriv
IKKI GERA IKKI NAKAÐ

**Inntriv** . Dr. Jakobsensgøta 9 . FO-100 Tórshavn . telefon 357 357 . fax 357 350 . inntriv@inntriv.fo . www.inntriv.fo